

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 03 - 2013

# Arktis verður sum Miðjarðarhavið

Kanningar hjá amerikonsku granskarunum Scott Stephenson og Laurence Smith vísa, at um ikki so mong ár verður Arktis sum eitt annað Miðjarðarhav t.v.s. eitt hav umgyrt av londum. Granskararnir, ið arbeiða á lærda UCLA-háskúlanum í Kalifornia, siga, at millum 2040 og 2050 verður siglandi alt árið ígjøgnum Arktis, og at tað verður ikki neyðugt við ísbrótarum ella ísstyrktum skipum. Tvørturímóti fara vanlig handilsskip at sigla úr eitt nú Kanada til Russlands tvørtur um tað, sum nú er Norðpólurin. Sostatt verður tað ikki neyðugt at sigla fram við landinum, og tað fer at gera farleiðina styttri og harvið bíligari. Men vandi er í hvørjari vælferð, sigur tað gamla orðið. Teir báðir granskararnir siga, at altjóða samfelagið fær neyvan stundir til at gera neyðugar lógir og reglur um sigling á teirri nýggju farleiðini, sum ivaleyst verður vanlig hjá handilsskipum og helst eisini ferðamannaskipum. Harafturat vísa kanningar á lærda Carlton-háskúlanum í Kanada, at tað er stórur vandi fyri ringum veðri og stórari aldu í Arktis, tá tað verður opið hav.